*Framhald av síðu 17*



*Um allan heim seta fólk spurnartekin við trúskapin hjá myndugleikunum og ætlanirnar hjá fyritøkunum. Tey stúra fyri, at kapitalisman hevur fingið ov víðar ræsur, og at ov nógvir taparar eru*

hjá amerikanarum. Demokratarnir vilja selja liberalar dygdir, republikanararnir konservatismu. Teir vísa myndir av einari kinesiskari gentu og einum amerikanskum drongi, ein svørt kvinna og ein hvít leiðast.

Men tá teir hava fingið valdið, bjóða teir tað sama: Ein lat-standa-til-búskap, valdið hjá pengunum og fríhandlinum. Stórfyritøkan er kongur, staturin tegnur og borgararnir forbrúkarar.

Men, skrivar Noreena Hertz:

*"Eg pástandi, at skipanin ridlar. Aftan fyri tað hugsjónarliga einmælið og kapitalismunar góðkenda stórsigur fer tað at rivna. Er alt so fantastiskt, hví er tað so soleiðis, at fólk fara ikki á val, men heldur út á gøturnar og í vøruhúsini? Hvat er meiningin við demokratinum, tá bara helvtin av teimum, sum hava atkvøðurætt, møta upp, sum td í valstríðnum millum Bush og Al Gore fyri 4 árum síðani, hóast øll vistu, at tað stóð á jøvnum teirra millum? Hvat er kjarnin í politiskari umboðan, um – sum eg skal vísa seinni – politikararnir akta stórfyritøkurnar í staðin fyri borgararnar."*

Tað tók sína tíð, áðrenn nakar mótmælti gongdini. Og hví skuldu fólk eisini tað? Alt tóktist jú at ganga upp á stás. Meginpartin av seinasta 20 ára skeiðnum hækkaði partabrævamarknaðurin, meðan renturnar fullu. Í Vesturheiminum áttu flestøll húski bæði sjónvarp og bil. Børnini gingu í góðum mótaklæðum. Miðalstættin bara vaks og vaks.

Mótmælini í Seattle, Göteborg og Genova vórðu nóg illa víst á skíggjanum. Í 1997 royndi ein kanadiskur felagsskapur at fáa ein antinýtsluboðskap fram. Ein tekning av einum grísi varð løgd yvir kortið av Norðuramerika. Hann smaskaði og segði: *"Miðal norðuramerikanarin etur fimm ferðir so nógv sum ein meksikanari, 10 ferðir meir enn ein kinesari og 30 ferðir so nógv sum ein indari… Steðga á! 28. november er keypsfríur dagur."* Men stórar amerikanskar sjónvarpsrásir sum NBC, CBS og ABC vildu ikki senda reklamuna, hóast tær fingu tilboð um vanligan prís. Tær vildu ikki senda eina reklamu, sum var ósambærilig við teirra handilsligu áhugamál. CBS skrivaði, at ein keypsfríur dagur stríddi ímóti teirri ráðandi búskaparligu skipanini í USA.

Arvur okkara er ein heimur, har forbrúk er tað sama sum búskaparpolitikkur, og har stórfyritøkurnar ráða og eru ódjór við ómetaliga stórari politiskari makt. Stjórnirnar hava framt privatiseringar, hava tikið eftirlit burtur og framt handilsliga liberalisering. Saman við tøkniligu menningini tey seinastu 20 árini hevur hetta havt eitt maktskifti við sær. 100 tær størstu fleirtjóða fyritøkurnar hava ræðið á umleið 20% av heimsins eginpeningi. Umsetningurin hjá General Motors og Ford er størri enn øll bruttotjóðarframleiðslan í Afrika sunnan fyri Sahara. Fíggjarliga styrkin hjá IBM, BP og General Electric umboðar eina búskaparmakt, sum er størri enn tann hjá teimum flestu smærru tjóðunum. Økonomiin hjá Exxon er líka stór sum tann hjá Chile og Pakistan.

Stórfyritøkurnar gerast alsamt størri. Í fyrsta árinum í nýggja túsundárinum vórðu Vodafone og Mannesmann løgd saman fyri 183 miljardir dollarar. Chrysler varð lagt saman við Daimler – fyritøkan hevur nú 400.000 fólk í arbeiði. Í 2000 vórðu tilsamans 5000 stórar fyritøkur lagdar saman, tvær ferðir so nógv sum fyri 10 árum síðani. Samanleggingarnar gerast alsamt størri, og myndugleikarnir lata standa til. Hvør einasta samanrenning gevur stórfyritøkunum størri vald. Stórfyritøkurnar hava ræðið á øllum vørum og tænastum, vit keypa: bensin, heilivág, vatn, flutning, útbúgving og teldur í skúlunum. Tær kunna føða okkum, styðja okkum ella kvala okkum, sum tær vilja.

## Myndugleikarnir liggja skerflatir

Hetta er heimurin hjá teirri tigandi kollveltingini fyrst í nýggja túsundárinum. Myndugleikarnir tykjast at vera niðurbundnir, og vit verða alsamt meira heft at stórfyritøkunum. Fyritøkurnar hava lættari og lættari við at flyta, og myndugleikarnir noyðast at vera lagaligir fyri at lokka fyri-tøkurnar til sín ella fyribyrgja, at tær rýma. Teir látast ikki at síggja hol í skattalógini. Tíðindarisin Robert Murdoch rindar ikki meira enn 6% í skatti tilsamans um allan heim. Í Bretlandi rindaði fyritøkan ongan netto felagsskatt yvirhøvur fram til árslok í 1998, hóast yvirskotið var 1,4 mia. pund síðani juni 1997. Hetta er ein heimur, har tey fólkavaldu leggja seg skerfløt fyri vinnulívinum, hóast avleiðingarnar av tódnaðari skattainntøku longu síggjast í vánaligari almennari tænastu og í undirstøðukervinum.

Tað var tann tíð, tá statirnir stríddust fyri at vinna størri landaøki. Nú stríðast teir fyri størri marknaðarparti. Eitt høvuðsstarv hjá statinum er at tryggja vinnuni góð kor. Tjóðríkini – ella nasjonalstatirnir – hava í dag tað høvuðsstarv at bjóða vinnuni almennar góðgripir og tann infrastrukturin, henni tørvar, fyri so lágan kostnað sum gjørligt. Samstundis verja tjóðríkini heimsins fríhandilsskipan.

Meðan henda gongd hevur verið, eru bæði rættvísi, javnstøða, rættindi, umhvørvi og sjálvt trygdarspurningar farin fyri bakka. Tak td Taliban – USA styðjaði stýrið fram til 1997 orsakað av amerikanskum oljuáhugamálum, hóast stýrið als ikki helt mannarættindini. Ongantíð fyrr hevur gjógvin millum rík og fátæk verið so stór sum nú. 45 miljónir amerikanarar hava onga heilsutrygging. Amerikanarar brúka miljardir av dollarum um árið til kosmetikk, men heimurin hevur ikki ráð at lata ST fáa tær 9 miljardirnar, sum eru neyðugar til tess at tryggja øllum fólkum góð saniter viðurskifti og reint drekkivatn. Bretski Arbeiðaraflokkurin Labour er endurgivin fyri at hava sagt, at tað hevur størri týdning at *skapa ríkidømi enn at býta tað út.*

Í 10 ára skeiðinum frá 1988 vaks inntøkan hjá teimum fátækastu í USA bara við 1% og vaks samstundis 15% hjá tí ríkasta fimtinginum av fólkinum. Í New York er inntøkan hjá teimum fátækastu 20% av fólkinum í miðal 10.700 dollarar um árið, meðan tey ríkastu 20% tjena 152.350 dollarar. Miljónir av amerikanarum, sum *hava* arbeiði, og eitt av fimm børnum liva í fátækadømi. Gjógvin millum fátæk og rík hevur ikki verið so stór síðani 1920-ini. Beint fyri aldaskiftið var ognin hjá Bill Gates líka stór sum nettoognin hjá fátækastu helvtini av amerikanska fólkinum.

Kapitalisman hevur sigrað, men øll sleppa ikki upp í part, tá skift verður. Myndugleikarnir látast ikki at síggja veikleikarnar.

Og skipanin er rotin. Alt ov nógvar politiskar gølur eru: Helmuth Kohl, Helmuth Schmidt og Mitterand eru millum teirra, vit kenna ella hava illgruna til. Reinførir politikarar skylda vinnulívinum meir og meir.

Ongastaðni sæst hetta so væl sum í USA. Forsetaskeiðini hjá Clinton druknaðu í gølum frá fyrsta degi: frá Whitewater-skuldsetingunum til tað seinasta miskunnsemi mótvegis skattasvikaranum og vápnahandilsmanninum Marc Rich. Fyri at gerast forsetavalevni í 2000 var sum altíð neyðugt at vissa sær stuðul frá stórfyritøkum. Al Gore hevði 133 og Bush 191 mió. dollarar at ráða yvir. Báðir flokkarnir mótmæltu einum lógaruppskoti um at seta forboð fyri, at vinnulívið, fakfeløg og einstaklingar kundu geva flokkunum óavmarkaðar peningaupphæddir til valstríðið.

Tað er ikki so løgið, at stjørnan hjá politikarum bliknar. Fólk eru varug við teirra áhugamálsstríð og venda sær frá politikkinum. Í 80-árunum breiddi demokratiið seg um allan heim við fólksins stuðli, men í nítiárunum minkaði vallutøkan mestsum allastaðni. Limatalið í flokkunum minkaði, og virðingin fyri politikarum fór sama veg. Allastaðni, frá teimum gomlu demokratiunum í USA og Vesturevropa til tær ungu tjóðirnar í Latínamerika og Eysturasia, hava fólk minni álit á tí almenna enn fyri 10 árum síðani. Í 2001 var vallutøkan í Bretlandi ikki meira enn 59%, 10% minni enn í 1997 og minsta luttøka síðani fyrra heimsbardaga.



*Saman við Ronald Reagan gav Margaret Thatcher stórfyritøkunum ómetaligt vald*